















# Frálík hús í Klaksvík við panorama-útsýni

Frálíku húsini standa norðuri á Selheyggi við sera góðum útsýni yvir víkina og býin

**Fyrsta fatanin**
Fyrsta fatanin, tá ið tú kemur til húsini, er, at her er talan um eini snøgg, eldri hús, ið standa væl fyri ,nærindis miðbýnum.

**Húsini**
Húsini eru væl hildin og í góðum standi. Niðasta hæddin er øll innrættað – møguleiki er at gera baðirúm – og kann hon so nýtast til sjálvstøðuga íbúð.

**Ljós og luft**
Húsini standa væl fyri. Har er veðurgott, góður sólargangur og stórsligið er útsýnið yvir Klaksvíkina, út á sjógv, norður á Kunoyarnes og eystur í Gravardal.

**Stílur og snið**
Stílurin er nýmótans – lættur og ljósur. Øll miðhæddin er gjørd av nýggjum, úr góðum tilfari. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar. Tær nýtist einki at gera alt er sum tað eigur at vera.
Stórur partur av loftinum er eisini gjørdur av nýggjum.

**Umhvørvið**
Húsini standa í friðarligum úmhvørvi, men kortini nær við allar hentleikar.

**Fakta**
Húsini eru í 3 hæddum - hvør hædd er uml. 61,5 fermetrar. Húsini eru stoypt heilt upp, klødd við alminiumsplátum, tann sunnara síðan av húsinum er klødd við timbri í 1994. Húsini vórðu í 1974 endurbøtt.
Síðani 2002 eru vindeyguni skift út við plastikk-vindeygu, tey flestu gólvini, fleiri innveggir og hurðar eru eisini skift. Í miðhæddini er gongd, køkur, stova og trappuniðurgongd. Í ovastu hædd-ini er gongd, hjúnarúm, brúsirúm, wc og 4 kømur. Í niðastu hæddini er gongd, køkur/stova og kjallararúm/fýrrum. Húsini hava sera vakurt útsýni yvir Klaksvíkina.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni